4

Landssjúkrahúsið

Til
Heilsu- og innlendismálaráðið

Tórshavn 25. januar 2019

**Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um virksemi á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum**

Landssjúkrahúsið hevur niðanfyri nevndu viðmerkingar:

***Til kapittul 3***
Visitasjón og heilivágsviðgerð §4 er ásett, at persónur, ið "kann" innskrivast á ein viðgerðarstovn, skal visiterast av einum vakthavandi serlækna.

Í hesum føri er týdningarmikið at fáa staðfest munin á ávísing, visitasjón og útskrivan, OG

- hvør ávísir til innskriving (Hetta eigur helst at vera kommunulækni á vakt)
- hvør visiterar til innskriving (støða má takast til, hvør visiterar)
- hvør útskrivar

Eisini átti at verið ásett, hvørt viðgerðarstovnurin kann nokta innskriving ella ei.

***§5 stk. 3***
Ynskiligt er, at orðing niðanfyri:
…." Løggild heilsustarvsfólk hava ikki loyvi til at upp- ella niðurskamta tann viðgerðarfyriskipaða heilivágin hjá einum rúsdrekka- ella rúsevnamisnýtara uttan frammanundan at hava fingið loyvi til tess frá einum lækna."
Til dømis til orðingina:
…." Løggild heilsustarvsfólk hava ikki loyvi til at upp- ella niðurskamta tann viðgerðarfyriskipaða heilivágin hjá einum, ið hevur rúsdrekka- alle rúsevnamisnýtslu, uttan frammanundan at hava fingið loyvi til tess frá einum lækna."

Vinarliga

Margit Stórá
Varastjóri

Stjórnarskrivstovan
J.C. Svabosgøta 41-49, FO-100 Tórshavn, Tel. (+298) 304500 fax 314253 www.ls.fo ls@ls.fo